# Býráðið

**Dagfesting:** 25.06.2026 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | |
| 18/26 | 26/00325-1 | Kunningarstovan/(Ribarhús) - fyrispurningur um eyka starvsfólk |
| 19/26 | 26/00043-2 | Dagføring og endurnýggjan av gjaldskrá fyri Fuglafjarðar Havn |
| 20/26 | 26/00278-1 | Eykajáttan mai 2026 |
| 21/26 | 26/00260-3 | Sandflogbóltsvøllur í Fuglafirði og Oyggjaleikir 2027 |
| **Referatsager** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Ein skjót meting frá Kunningarstovuni er, at á leið 40 -50 fólk vitja dagliga. Tá er talan um støk ferðandi og ikki bólkar. T.d vóru 100 fólk á gátt hósdagin 4. juni umframt 2. bólkar.<br>Síðani Kunningarstovan er flutt yvir í Ribarhús, hevur Kunningarstovan hevur mist tað hjálp, sum stóð av synergiðini av Bókasavninum. Tvs. at kunningarstovan er farin niður í tíð, alt meðan talið av vitjandi er fleirfaldað.<br><br>Eisini aðrar fyritøkur, hava víst á at tørvur er at halda Ribarhús opið, soleiðis at vitjandi hava møguleika at leingja um vitjanina í býnum og eisini leggja fleiri pengar eftir seg.<br><br>Fuglafjørður hevur nógv at bjóða og eigur Fuglafjarðar kommuna at taka á seg lutin at bjóða ferðafólkum vælkomnum og økja um møguleikarnir at vitja okkara bý. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Framløga og áheitan frá leiðaranum á heimavirkinum í Fuglafirði og innkomið skriv frá fundinum 26. mai. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl |
| Viðgerð | |

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | J | N |
| | Umsitingarligar | N | N |
| Tilmæli | Mælt verður til skjótast møguligt at seta eitt starvsfólk at hjálpa til á Kunningarstovuni, at arbeiða fulla viku fram til 1. okt. 2026. Treytin er at halda Ribarhús opið leygardagar 9 -18 og sunnudagar 13 -18. | | |
| Dagf | 04.06.2026 | | |



**<u>Mentamálanevndin 09. juni 2026:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, og mælir til at 75 tkr verða fígjjaðar av RS 564 og restin tikin av RS 792 við eini evt. eykajáttan seinri í heyst. Tað er umráðandi fyri nevndina at Ribahús verður opið leygardagar og sunnudagar.

**19/26**

**26/00043-2 Dagføring og endurnýggjan av gjaldskrá fyri Fuglafjarðar Havn**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 09.02.2026 | 2/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.02.2026 | 11/26 |
| 3 Býráðið | 26.02.2026 | 7/26 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 25.02.2026 | 4/26 |
| 5 Fíggjarnevndin | 26.02.2026 | 13/26 |
| 6 Vinnu- og havnanevndin | 09.03.2026 | 6/26 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.03.2026 | 14/26 |
| 8 Býráðið | 25.03.2026 | 9/26 |
| 9 Vinnu- og havnanevndin | 16.06.2026 | 17/26 |
| 10 Býráðið | 25.06.2026 | 19/26 |

5

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Vinnu- & havnanevnd og Fíggjarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Grunda á at gjaldskráin er útgingin, er neyðugt at endurskoða og dagføra verandi gjaldsskráð. Tí verður mælt til at leingja verandi gjaldskrá til 01.03.2026, meðan viðgerð av møguligum gjøldum fer fram í viðkomandi nevndum.<br>Uppskot er til at fáa leigumál av/í egningarmiðstøðini við í gjaldskránina fyri Fuglafjarðar havn. Uppskot til mánaðarliga gjald av teimum stóru leigumálunum er 1.000,- kr.+ el mánarliga.Tilboð til leigaran er, at gera eitt ársgjald áljóðandi 10.000,- kr.+ el gjald árliga og skal gjaldast 15. januar við ársbyrjan.<br>Uppskot til mánaðarliga gjald av teimum minnu leigumálunum er 700,- kr.+ el mánarliga.Tilboð til leigaran er at gera eitt ársgjald áljóðandi 5.000,- kr. + el árliga og skal gjaldast 15. januar við ársbyrjan.<br><br>**Til fundin í Vinnu- og havnanevndini 25.02.2026**<br>Uppskotið til gjaldskrá er dagført aftaná fundi í fíggjarnevndini. Eisini eru prísirnir til loðsing dagførdir sambært Kunngerð nr. 201, frá 11. desember 2025 um loðsing, gjøld, eftirlit o.a.<br><br>**Til fundin í Vinnu- og havnanevndini 09.03.2026** |

**Vinnu- og havnanevndin 09. februar 2026:**
Vinnu- og havnanevndin samtykti at taka leiguna fyri egningarmiðstøðina við í gjaldskránna og taka undir við uppskotinum við gjaldinum. Vinnu- og havnanevndin samtykti at Fuglafjarðar kommuna skal gjalda leigu fyri hølini ið teir brúka á egningarmiðstøðini. Gjaldið verður tað sama sum onnur leiga fyri. Vinnu- og havnanevndin samtykti at leingja verandi gjaldskrá til 01.04.2026. Endurskoðað gjaldskrá skal leggjast fyri vinnu- og havnanevnd til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 19. februar 2026:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini við hesum viðmerkingum:

- Tilboð til leigaran av smærri hølunum í egningarsmiðstøðini um gjørt verður eitt ársgjald áljóðandi skal vera 7.000,- kr. + el árliga og ikki 5.000,- kr. árliga.
- Skjalið við vørugjøldunum skal rættskrivast áðrenn tað verður lagt fyri býráðið.

**Vinnu- og havnanevndin 25. februar 2026:**
Eyðun á Lakjuni møtti vegna Kristian Martin Petersen.
Vinnu- og havnanevndin mælir til at taka gjaldsskránna fyri Fuglafjarðar havn av skrá til býraðsfundin 26.02.2026. Vinnu- og havnanevndin ynskir at hava ein arbeiðsfund saman við umsitingini at tillaga gjaldsskránna endaliga til býráðsfundin í mars 2026. 7

**Býráðið 26. februar 2026:**
Borgarstjórin beindi eftir áheitan frá Vinnu- og havnanevndini málið aftur í nevnd.

**Vinnu- og havnanevndin 09. mars 2026:**
Kristian Martin og Jóan Pauli taka undir við at tillaga gjaldskránna sambært broytingum, ið eru nevndar í hesum skjalinum, tó skal smábátagjaldið ikki broytast. Somuleiðis skal orðingin viðvíkjandi avrunding til heilar krónur strikast.

Ørvar mælir til, at allir prísir verða javnaðir eftir almenna prístalinum.

**Fíggjarnevndin 19. marts 2026:**
Meirilutin í Fíggjarnevndini Dávur Juul og Eyðun á Lakjuni taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í Vinnu- og havnanevndini, meðan minnilutin Ólavur Larsen tekur undir við tilmælinum frá minnilutnum í Vinnu- og havnanevndini.

Ein samd fíggjarnevnd vil hava ein takst fyri súrløgu uppá 10 kr./tons inn og út.

**20/26**
**26/00278-1 Eykajáttan mai 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.05.2026 | 25/26 |
| 2 Býráðið | 28.05.2026 | 14/26 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.06.2026 | 30/26 |
| 4 Býráðið | 25.06.2026 | 20/26 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Nú roknskapurin er tøkur fyri 2025 er staðfest ein minninýtsla á løgum uppá 6,3 mió. kr.<br><br>Hetta kemst av at nakrar íløgur eru seinkaðar og tað at Eysturkommuna síðst í árinum hevur goldið 4 mió. kr. í samband við íløguna í 64-skúlan.<br><br>Tørvur er at fáa flutt játtan uppá íalt 6,25 mió. kr. frá 2025 til 2026 og er hesin peningur býttur á hesar konti:<br><br>**Rakstrarstað** / **Játtan 2025** / **Nýtsla 2025** / **Flyta til 2026** (see table below)<br><br>Harafturat tað er neyðugt at geva eina eykajáttan uppá 100 tkr. til rakstrarstað 536 Mentanarvikan, tí at nettojáttanin av misgáum er lækkað við 100 tkr. í upprunaligu fíggjarætlanini. Hetta komst av, at 100 tkr. vórsu sett á kontu 21 Søla av vørum og tænastum, uttan at hækka játtanina á konto 14 keyp av vørum og tænastum samsvarandi.<br><br>**Til býráðsfundin 28.05.2026**<br>Fíggjarnevndin hevur á fundi 27.05.2026 umrøtt játtanina til at skifta graslíki á fótbóltsvøllinum og mælir til at hækka játtanina til RS 571 við 2,3 mió. kr. afturat. Hetta kemst av príshækkingum og kostnaði av at burturbeina verandi vøll og undirlag. |

| Rakstrarstað | Játtan 2025 | Nýtsla 2025 | Flyta til 2026 |
|---|---|---|---|
| 160: Býráðshúsið | 1.650.000 | 791.939 | 850.000 |
| 430: 64-skúlin | 12.000.000 | 8.897.877 | 3.100.000 |
| 571: Fótbóltsv. | 1.100.000 | 176.538 | 900.000 |
| 637: Kirkjug. | 1.550.000 | 797.189 | 750.000 |
| 674: Vegir (Hellurnar) | 500.000 | 492.435 | 250.000 |
| 711: Umhvørvispl. | 2.400.000 | 2.028.732 | 400.000 |
| **Íalt** | | | 6.250.000 |

9

**Fíggjarnevndin 21. maj 2026:**
Fíggjarnevndin metir ikki tað er rætt at flyta 250 tkr. RS674 frá 2025, men mælir í staðin fyri at veita RS674 eykajáttan á 250 tkr., sum verður fíggjað av innistandandi. Fíggjarnevndin tekur undir við at flyta hinar 6,0 mió. kr. frá 2025 til 2026, at játta 100 tkr. til Mentanardagar og at játta 250 tkr. til stuðulskonto RS550 á mentanarøkinum.

**Býráðið 28. maj 2026:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um eina eykajáttan uppá íalt 8,9 mió. kr.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2026:**
Fíggjarnevndin mælir til at taka útreiðsluneutralu flytingina uppá 75 tkr. frá RS 564 til RS 792 við í eykajáttanina og við hesi broyting at taka undir við eykajáttanini.

**Býráðið 25. juni 2026:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum um eykajáttana frá fíggjarnevndini.

11

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Av tí at Flogbóltsambandið frá fyrsta fundi vísti á, at sambandið varð áhuga í at gera ein varandi vøll til frama fyri sandflogbóltsítróttina, so verður mælt til at støða verður tikin í málinum, eisini við atlit til býráðssamtykt 01. mai 2025. |
| Dagf | 08.05.2026 |

**Mentamálanevndin 12. maj 2026:**
Nevndin mælir til at leggja sandflogbóltsvøllin á økið har Kyrjasteinur liggur. Í hesum sambandi verður heitt á teknisku deild, um í fyrsta lagi at gera eina kostnaðarmeting av hvat tað kostar at flyta/burturbeina Kyrjastein og í øðrum lagi at taka støðu til hvat kann/skal endurnýtast av Kyrjasteini. Tilmælið við kostnaðarmeting verður lagt fyri býráðið á fyrst komandi býráðsfundi.

**Býráðið 25. juni 2026:**
Ólavur Larsen kom við broytingaruppskotið um, at staðseta sandflogbóltsvøllin við Ítróttarhøllina á Kambsdali.

Fyrst varð atkvøtt um uppskotið frá Ólavi Larsen. Ólavur Larsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddu fyri meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu ímót. Uppskotið fall sostatt.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá mentamálanevndini. Ólavur Larsen, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddu ímóti meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø og Eivin Breiðaskarð atkvøddu fyri. Uppskotið varð sostatt samtykt.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo